## Skarvanes varðveitir húsanøvn

So við og við broytast føroysku bygdirnar – har tað bert fyrr vóru húsanøvn til tey ymsu húsini, so verður hetta meira og meira broytt til at nummar verður sett á húsini. Men so verður ikki á Skarvanesi, sigur Jacob Martin Debes, bóndi á Skarvanesi á heimasíðuni hjá Sandoyar Kunningarstovu. Í Skarvanesi er nevniliga ætlanin at varðveita gomlu nøvnini ístaðin fyri nýggj nummur. Nøvnini á Skarvanesi eru hesi: Við Geilará, Skúlin/ Bønhúsmørk og Kirkjumørk, Kárastova, Gomlustovu, Skemman, Niðri í Trøð, Á Fløtti, Uppi í Trøð, Á Fjallinum

# Hevur onkuntíð verið stuttligari

**- Tað hevur onkuntíð verið stuttligari at reka saltfiskaframleiðslu, enn tað er í dag, nú tað er so trupult at fáa hendur á fiski. Fiskurin er dýrur, samstundis sum marknaðarprísirnir ikki eru øktir í sama mun, sigur Jógvan Gregersen, stjóri á Vaðhorn, ið nú fær Jens Martin Knudsen sum nýggjan virkisleiðara**

SALTFISKUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Føroyskur saltfiskur hevur verið frammanfyri saltfiskin hjá okkara grannum í fleiri ár – bæði í dygd og prísi, men nú sansar at. Keyparar siga, at nú er minni munur á tí besta saltfiskinum – og tí ringasta. Aðrir hava lagt seg eftir at framleiða eina betri vøru, og hetta ger, at kappingin um marknaðin er harðari enn áður*

Í 2003 varð saltfiskavirkið Vaðhorn á Strondum kosið at vera Ársins virki. Hetta er eitt lutfalsliga lítið virkið, ið vit kunnu siga legði øll hini aftur um seg í hesi kapping. Vinnuhúsið, sum skipar fyri Vinnudegnum, har Ársins virki verður kosið, segði í sínum viðmerkingum, at á Vaðhorn arbeiða sera dugnalig fólk, og hetta árið var eingin ivi um, at Vaðhorn skuldi hava heiðurin sum Ársins virki.

Jógvan Gregersen var stjóri á virkinum í 2003, og hann er stjóri á virkinum enn í dag.

Nú er hann eisini annar av eigarunum.

### Nýggjur virkisleiðari

Í summar keyptu Háldan Haldansen og Jógvan Gregersen Vaðhorn, og nú frá 1. oktober verður Jens Martin Knudsen virkisleiðari á saltfiskavirkinum á Hulki.

Jansy Brøðraberg hevur verið virkisleiðari á Vaðhorn í fleiri ár, og stjórin sigur, at hon hevur verið serstakliga skilagóð, ófør og dugnalig.

- Jansy hevur soleiðis fingist við fólk í nógv ár, og nú ynskir hon at halda fram at arbeiða á virkinum sum vanligt arbeiðsfólk.

Jógvan Gregersen sigur, at Jens Martin Knudsen hevur fingist nógv við fisk, og hann hevur eisini leiðaraútbúgvingar innan ótrótt, sum eisini snúgva seg um at fáast við fólk og at skipa fyri.

Teir, sum hava átt Vaðhorn síðan endurstovnanina 1. januar 1995, vóru eitt nú Teymavirkið, Kambur, Strandingur, Skipasmiðjan – og seinni var Framtaksgrunnurin eisini komin upp í eigaraskaran.

- Nú eru tað so vit báðir, sum eiga virkið, sigur Jógvan Gregersen, ið hevur starvast sum stjóri á Vaðhorn í eini 5-6 ár.

Eini 40 fólk arbeiða hjá Vaðhorn.

### Trupul tíð

Í fiskivinnuni gongur upp og niður, bæði á sjógvi og landi. Høvuðsrávøran hjá Vaðhorn er toskur, og nú lítil toskur er at fáa, er hesin nógv eftirspurdur og dýrur at fáa hendur á.

- Ja, eg vil siga, at tað hevur onkuntíð verið stuttligari at reka slíka framleiðslu enn í dag, nú tað er so trupult at fáa hendur á fiski – og fiskurin er so dýrur, samstundis sum marknaðarprísirnir ikki eru øktir í sama mun.

Jógvan sigur, at av rávøruni, sum virkið hevur keypt higartil í ár, er 45% toskur, 32% brosma og 23% longa.

- Toskur skuldi helst verið ein uppaftur størri prosentpartur, men tað er tørvur á toski bæði her hjá okkum og eitt nú í Íslandi og Noregi. Toskur er soleiðis ein rættilig mangulvøra í løtuni, sigur hann.

At so lítil toskur kemur upp á land, merkir eisini, at minni fiskaarbeiði er á saltfiskavirkjunum, sum leggja dent á toskin í síni rávøru.

- Toskurin, sum vit fáa hendur á, er skjótur at koyra ígjøgnum maskinurnar, og ikki minst seinastu 3-4 vikurnar hevur hesin fiskur verið ringur at fingið hendur á. Hetta hava vit merkt, so tað forslær, sigur hann.

Jógvan Gregersen fegnast annars um, at prísirnir fyri saltfisk, sum er virkaður úr toski, kvinkar uppeftir í løtuni.

- Hetta er eisini neyðugt, tí í longdini kann eingin framleiða eina fiskavøru við halli, sigur hann.

### Munurin minkaður

Føroyskur saltfiskur hevur í nógv ár havt sera gott orð á sær úti á marknaðinum, og føroyskir framleiðarar hava fingið betri prís fyri sínar vørur enn onnur lond, vit vanliga samanbera okkum við.

- Men spurningurin er, nær hesir prísir eru komnir har til, at fólk ikki hava ráð at geva meira fyri hendan fiskin. Tað vita vit ikki, sigur Jógvan.

Hann vísir á, at ikki minst íslendingar eru farnir at gera sær størri ómak við saltfiskinum, og hetta ger, at kappingin við íslendska fiskin er harðari nú enn áður.

Spurdur, um íslendingar gjøgnum árini hava "kopierað" føroysku saltfiskaframleiðsluna, sigur stjórin, at helst er nakað um tað.

- Men, sum eg nevdi, gera teir sær eisini størri ómak nú enn áður, leggur hann aftrat.

Keyparalondini fyri fiskavørurnar hjá Vaðhorn eru serliga Spania og Italia.

- Ein italskur keypari segði, at í dag er minni munur millum besta saltfiskin – og hin ringasta. Hetta merkir so aftur, at kappingin á hesum marknaði er harðari enn áður, og tí er torført at liggja frammanfyri hinar

# Happing og sorgarleikur

Ein 50 ára gamal maður í Svøríki hevur eftir øllum at døma skotið tveir dreingir við høglbyrsu. Dreingirnir hava í langa tíð happað 19 ára gamla og brekaða sonin hjá manninum

Hendingin fór fram í Karlskrona seinasta vikuskiftið.

Sum skilst, hava dreingirnir happað 19 ára gamla og brekaða sonin hjá tí 50 ára gamla.

Hetta fekk sera álvarsligar avleiðingar. Ein 15 ára gamal drongur læt lív av skotum úr høglbyrsu, og ein 16 ára gamal er álvarsliga særdur.

Tað er svenska tíðindastovan TT, sum bar tíðindini.

Løgreglan hevur tikið ein 50 ára gamal mann í sambandi við tilburðin, og hesin er nú mistonktur í málinum. Tað var ein í familjuni hjá tí handtikna, sum boðaði frá tilburðinum.

Sambært TT, læt tann 50 ára gamli løgregluni høglbyrsuna.

Motivið til hendingina, siga fólk í økinum vera, at ungdómar í langa tíð hava happað tann 19 ára gamla og brekaða sonin hjá tí 50 ára gamla.

- Her hevur verið eitt øgiligt "spetakkel" við tveimum dreingjum, sum hava happað og oyðilagt ting hjá tí brekaða. Øll vita, hvørjir dreingirnir eru. Familjan hevur ikki kunnað havt ein postkassa - uttan, at hann er vorðin oyðilagdur. Happingin hevur gingið fyri seg í langa tíð, sigur vitnið.

Svenska løgreglan leitar nú eftir øðrum ungdómum, sum vóru vitni til sorgarleikin í Svøríki.

**-vilmund**

# Børnini á Eiði aftur til ta

**Tordur J. Niclasen, borgarstjóri í Eiðis kommunu og Oddmar Færø, tannlækni, hava skrivað undir sáttmála, sum tryggjar børnunum í Eiðis kommunu regluligar kanningar og viðgerð**

HEILSA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í langa tíð hava børn og ung í Eiðis kommunu so at siga ligið í tannlæknaloysi.

Men nú eru hesi viðurskifti komin upp á pláss aftur.

Tann 1. oktober undirskrivaðu borgarstjórin í Eiðis kommunu, Tordur J. Niclasen og Oddmar Færø, tannlækni, sáttmála um regluligar kanningar og viðgerð.

Borgarstjórin sigur við Sosialin, at sáttmálin soleiðis tryggjar børnum og ungum í Eiðis kommunu regluliga viðgerð tvey tey næstu árini.

- Tannlæknin fer at húsast á tannlæknastovuni í Hvalvík, sum vit hava selt Oddmari Færø.

Tordur J. Niclasen sigur, at sáttmálin millum partar



nar kemur í gildi beinanvegin.

- Vit fegnast um hesa avtalu, sum nú kemur børnum og ungum í kommununi til góðar longu frá 1. oktober, sigur borgarstjórin í Eiðis kommunu.